

*Frá 1996 til 2000 samstarvaðu fleiri føroysk feløg við japanar um royndarfiskiskap eftir tunfiski undir Føroyum. Eingin heimild var at lata hesi loyvi, ið føroysku feløgini síðan fingu vinning burturúr frá japansku skipunum, sigur Landsstýrismálanevndin, ið finst hvassliga at landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen.*

# Tunfiskaloyvini vóru givin í heimildarloysi

**Fiskimálastýrið hevur umsitið tunfiskaloyvini í heimildarloysi. Hetta er endaliga niðurstøðan hjá Landsstýrismálanevndini, ið hevur kannað málið í yvir tvey ár. Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, vísir skuldsetingunum aftur, men ásannar tó, at rættast hevði verið at nýtt annan framferðarhátt heldur enn at lata loyvi til føroysk feløg, ið samstarvaðu við japanar.**

ALMENN UMSITING
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Endamálið við samstarvinum millum føroyingar og japanar var, at føroysku feløgini seinni sjálvi skuldu koma við skipum og fara undir hesa veiðu. Men nú aftaná kunnu vit bara staðfesta, at tað hendi ikki, sigur Jørgen Niclasen, ið tó ikki metir, at nakað ólógligt er farið fram.*

Landsstýrismálanevndin er komin við sínari endaligu niðurstøðu í málinum um tunfiskaloyvini, ið fiskimálastýrið lat ávísum reiðaríum, árini frá 1996 til 2000.

Nevndin sigur millum annað í síni niðurstøðu: »Heimildargrundarlagið fyri at veita tilsøgnir um royndarloyvi eftir tunfiski til kommersiella nýtslu hevur ikki verið til staðar, og fyrrverandi og sitandi landsstýrismaður í fiskivinnumálumhevur ikki havt neyðugt eftirlit við, at slík kommersiel nýtsla fór fram, hóast tað varð upplýst, at hetta var ein møguleiki, ið umsøkjarar høvdu umhugsað.« Víðari sigur Landsstýrismálanevndin, at viðvíkjandi málsviðgerðini hevur nevndin ikki fingið afturvíst sín illgruna um, at henda í ávísan mun hevur verið tilvildarlig, og at allir borgarar ikki hava verið viðgjørdir eins.

## Føroyskir millummenn

Málið um tunfiskaloyvini, sum hevur ligið í Landsstýrismálanevndini í yvir tvey ár, snýr seg í stuttum um, at nevndin hevur havt illgruna um, at føroysk reiðarí hava fingið royndarloyvi frá Fiskimálastýrinum til at fiska tunfisk, fyri síðan at lata japanum loyvið afturfyri samsýning. Seinnu helvt av nítiárunum fingu nøkur føroysk skip loyvi til royndarveiðu eftir tunfiski í føroyskum sjógvi, og føroyskt skip royndu eisini henda møguleika. Men harumframt fingu tilsamans fýra reiðarí loyvi til royndarveiðu í samstarvi við japansk skip. Talan var um P/F Faroe Seafood Prime, Sp/f Nancy, sp/f Far-Nipp og seinni fekk eisini Sp/f Ågot eitt tílíkt loyvi.

Í øllum dømum var talan um samstarvsavtalur millum føroysk og japansk feløg, ið skuldu loyva skipum hjá japansku reiðaríunum at fiska í føroyskum sjógvi. Endamálið var at geva føroyingum nakrar royndir á hesum øki.

Henda skipan helt fram til 2000, tá Fiskimálastýrið metti, at føroyingar nú høvdu vunnið sær nóg drúgvar royndir til sjálvir at standa fyri fiskiskapinum.

Landsstýrismálanevndin finst í síni niðurstøðu at, at tað hevur borið til hjá føroyskum millummonnum at vunnið pengar burturúr royndarloyvunum, ið teir hava latið japanum. Nevndin vísir á, at Fiskimálastýrið als ikki hevur havt eftirlit við, hvørt hetta fór fram. Og tá landsstýrismálanevndin síðan bað Fiskimálastýrið um at eftirkanna, hvørt føroysku millummenninir høvdu fingið pengar burturúr samstarvinum við japanar, vísti tað seg, at so var.

Sum nevnt fór Fiskimálastýrið, eftir at Landsstýrismálanevndini hevði biðið um tað, at spyrja føroysku feløgini, ið høvdu royndarloyvini at nýta í samstarvi við japanar, hvørt tey høvdu havt vinning burturúr hesum samstarvi. Hetta var á vári í fjør. Eitt av feløgunum, ið eftir drúgva umhugsunartíð svarar Fiskimálastýrinum, er Sp/F Far-Nipp. Jákup Egholm Hansen, umboðsmaður fyri felagið, vísir á, at føroyska felagið hevur havt skyldu at útvega eitt japanskt skip til royndarveiðuna og eisini hevur føroyska felagið fulla ábyrgd av skipinum og øllum útreiðslum í samband við skipið. Víðari skrivar Jákup Egholm Hansen í brævi til Fiskimálastýrið, at talan hevur ikki verið um at Sp/F Far-Nipp hevur havt leiklutin sum millummenn, men at felagið er ein av loyvishavarunum og aktivur partur í royndarveiðuni, við bæði skyldum og rættindum. Hann vísir á, at í avtaluni við Fiskirannsóknarstovuna um royndarveiðuna stendur greitt, at veiðan er ogn hjá bæði føroyska felagnum og japanska skipinum. Og tá báðir partar eiga veiðuna í felag, kann ongantíð blíva talan um at selja royndarveiðuloyvið frá føroyska til japanska felagið. Eisini førir hann fram, at tað ongastaðni í avtaluni við Fiskirannsóknarstovuna ella í loyvinum frá Fiskimálastýrinum er kravt, at tey skulu góðkenna viðurskifti millum føroyska og japanska felagið, sum ikki hava við sjálvar loyvistreytirnar at gera.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, váttar, at Fiskimálastýrið ongantíð legði seg út í, hvørt føroysku feløgini fingu pengar burturúr samstarvinum við japanar. Jørgen Niclasen vísir á, at tað sum varð mett at hava størsta týdning, var at fáa royndarfiskiskapin í gongd, so tað kundi staðfestast, um tunfiskiskapur veruliga kundi gerast eitt alternativ hjá føroyskum fiskiskipum.

Men í maj 2000 tekur Jørgen Niclasen avgerð um ikki at ganga fleiri umsøknum frá føroyskum feløgum um, í samstarvi við útlendsk skip, at halda fram við royndarfiskiskapi eftir tunfiski í føroyskum sjógvi. Tað var gjørt, tí mett var, at royndirnar higartil høvdu givið føroyingum nóg góðan kunnleika til sjálvir at standa fyri fiskiskapi eftir tunfiski. Bara fáar mánaðir frammanunan hevði Fiskimálastýrið tó givið P/F Ågot í Klaksvík eitt tílíkt loyvi, og tí hildu royndirnar fram, nakað eftir at hesin leistur varð steðgaður.

- Endamálið við at geva loyvini til samstarvsavtalur millum føroysk og japansk reiðarí var upprunaliga, at føroysku reiðaríini seinni sjálvi skuldu koma við skipum og fara undir hesa veiðu. Men nú aftaná kunnu vit bara staðfesta, at tað hendi ikki, sigur Jørgen Niclasen.

## Royndin miseydnaðist

Út frá tí sannroynd, at eingin føroysk veiða eftir tunfiski spurdist burturúr royndunum, ið vóru gjørdar seinast í nítiárunum, staðfestir Jørgen Niclasen, at royndirnar í so máta mugu metast at verða miseydnaðar. Landsstýrismaðurin vísir á, at orsøkin til at samstarvsavtalurnar millum føroysk og japansk reiðarí vóru steðgaðar, var at hann tá metti, at føroyingar sjálvir áttu at hava ein virknari lut í framhaldandi royndum.

Landsstýrismálanevndin metir, at loyvini, ið eru givin føroyskum feløgum til at samstarva við japansk feløg um royndarveiðu eftir tunfiski, eru at rokna sum loyvi til kommersiella nýtslu, tvs. at føroysk feløg hava fingið pengar burturúr at lata japanar nýta loyvini. Og greiða niðurstøðan hjá nevndini er, at heimild var ikki at geva hesar tilsøgnir.

Jørgen Niclasen er ikki samdur við niðurstøðuni hjá Landsstýrismálanevndini. Landsstýrismaðurin førir fram, at talan var um royndarloyvi, og at talan var ikki um, at skip ella feløg sluppu at nýta loyvi hjá hvørjum øðrum.

Jørgen Niclasen ásannar tó, at høvdu royndirnar verið gjørdar í dag, hevði okkurt helst verið gjørt øðrvísi. Hann vísir á, at helst átti Fiskirannsóknarstovan at verið enn meira inni í myndini í samband við japansku skipini.

- Tað er greitt, at vitanina vildu vit jú hava, bæði um at fiska og at selja tunfiskin. Málið var, at vinnan skuldi útvega sær eina vitan um fiskiskap eftir tunfiski, og tí valdi man henda leistin. Men samtíðis nyttar einki, bara at geva japanskum skipum loyvi at fiska, uttan at vit fáa nakað burturúr. Í dag kunnu vit siga, at okkurt átti kanska at verið gjørt øðrvísi, so vit fingu meira burturúr, sigur Jørgen Niclasen.

- Tú kanst kanska siga, at endamálið við allari kanningini hjá Landsstýrismálanevndini var at steðga hasari mannagongdini, og eg valdi sjálvur at steðga henni fyri hálvum triðja ári síðan. Eg eri samdur við Landsstýrismálanevndini í, at hetta var kanska ikki tann heilt rætti mátin at nýta, og tað havi eg tikið til eftirtektar, leggur Jørgen Niclasen afturat.

Í dag er eingin føroyskur fiskiskapur eftir tunfiski. Tó hevur Fiskirannsóknarstovan samstarv við millum trý og fýra japansk skip um royndarveiðu.



# Ferðaavgjald til tunnilin

**Hóast Marjus Dam nú stendur einsamallur við uppskotinum um broytingum í ferðaprísinum í Vágatunnilinum, so leggur framvegis uppskotið fram. Uppskotið skal tryggja Vágatunnilinum ein part av ferðaavgjaldinum um Flogvøllin**

VÁGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*



*Mynd "Marjus og Jóanis": Ætlanin er framvegis at leggja eitt uppskot fyri tingið, ið gevur bílígari prísir undir Vestmannasundi. Jóanis Nielsen vil tó ikki fyribils vera við til at leggja uppskotið fyri tingið*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Fyri Marjus Dam, tingmann fyri Sambandsflokkin í Vágum, er tað ikki nóg mikið við einari lækking í ferðaprísunum at ferðast í Vágatunnilinum upp á 20%.

– Hesi 15-20% kunnu vágafólk ikki brúka til so nógv, sigur Marjus Dam.

Hann hevur áður saman við Jóanis Nielsen, tingmanni fyri Fólkaflokkin í Vágum, boðað frá, at teir fara at leggja eitt uppskot fyri Løgtingið, ið við lóg tvingar prísirnir fyri ferðingina ígjøgnum tunnilin niður.

Jóanis Nielsen hevur í Sjónvarpi Føroya sagt, at prísirnir eftir teirra uppskotið fara at lækka í eina helvt av verðandi prísi.

Seinni hevur tað víst seg, at vilji ikki hevur verið í Løgtinginum fyri at fremja hesar lógarbroyting. Jóanis Nielsen hevur eisini spælt við heilsuna hjá samgonguni í hesum málinum, men hevur talan bert verið um tos.

Uppskotið er ikki enn komið niðan í tingið, men tað er væl á veg.

Men nú tykist tað bert at vera Marjus Dam, ið leggur navn til uppskotið. Hann ætlar, sambært Jóanis Nielsen, at leggja uppskotið fyri tingið eina av fyrstu døgunum.

Jóanis Nielsen hevur nevniliga boðað Marjusi frá, at hann ynskir at bíða til Vágatunnilin kunngerð prísbroytingarnar.

– Eg havi boðað Marjusi frá, at eg velji at bíða eftir, hvat Vágatunnilin kunngerð. Eru lækkingarnar ikki nøktandi, so taki eg sjálvandi undir við uppskotinum, sigur Jóanis Nielsen.

Hann sigur, at hann allatíðina hevur tosað um at fingið bíligari prísir og góðan avsláttur til tey, ið ferðast javnan. Hann vil ikki siga, hvat er nóg mikið fyri hann, áðrenn hann kennir, hvørji tøl, ið Vágatunnilin kemur við.

Hesar broytingarnar, ið Jóanis Nielsen sipar til, skuldu eftir røttum verið kunngjørdar hósdagin, sambært Jóanis. Tá blaðið fór til prentingar vóru tó ongar broytingar kunngjørdar. Beint áðrenn evstamark fingu vit fatur á Dávid Reinert Hansen, stjóra fyri P/F Vágatunnilin, og hann segði, at broytingarnar í prísum ikki verða kunngjørdar, fyrr enn teir eru klárir.

– Hetta verður áðrenn 10. desember, var tað einasta, ið vit fingu at vita.

## Ferðaavgjald

Uppskotið frá vágatingmonnunum ella tingmanninum, sum tað óivað verður, er fyri langari tíð síðani klárt, men bíðað hevur bara verið við at leggja uppskotið fyri tingið.

Marjus Dam greiðir frá, at kjarnin í uppskotinum er, at Vágatunnilin skal fáa gagn av ferðaavgjaldinum, ið goldið verður av ferðafólki um flogvøllin.

– Ferðaavgjaldið verður hækkað við 60 kr, og hesir pengarnir verða fluttir til Vágatunnilin. Hetta vil geva umleið 4,5 mió. um árið. Hetta gevur so fleiri bilar og harvið bíligari prísir, sigur Marjus Dam.

Hann roknar við, at 4,5 mió. um árið vil geva munandi bíligari prísir samstundis sum fleiri bilar eisini koyra gjøgnum tunnilin. Hendan skipanin skal virka í tvey ár, er ætlanin.

Marjus Dam er av teirri fatan, at ferðslumetingin er sett alt ov varðliga.

– Tað búgva 2.800 fólk í Vágum. Hevði tað verið frítt at ferðast, so høvdu einir 2.800 bilar koyrt aftur og fram um samdøgrið. Hetta er tað sama sum ferðslan til bygdir sum Skála og Strendur, ið liggja avsíðis eins og Vágoyggin fer at gera við undirsjóvartunnilinum, sigur Marjus Dam.

Tað er hansara ynski, at vágafólk og vinnan í Vágum skulu fáa nógv betri treytir, tí sum er kunnu tey illa liva við hesum, heldur Marjus Dam.

# Manglandi reglur fyri fólk í almennum starvi

**Ein av teimum, ið fekk loyvi til at samstarva við japanar um royndarfiskiskap eftir tunfiski, var felagið hjá Bjarta Thomsen, ið tá starvaðist á Fiskirannsóknarstovuni. Landsstýrismálanevndin átalar, at ongar reglur eru, sum seta etisk mørk fyri leiklutinum hjá almennum starvsfólki í teirra privata virksemi mótvegis tí almenna**

ALMENN UMSITING
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tilsamans fýra føroysk feløg fingu loyvi til at gera samstarvsavtalur við japansk reiðarí um royndarfiskiskap eftir tunfiski í Føroyskum sjógvi, árini frá 1996 til 2000. Eitt av hesum feløgum var Sp/F Nancy á Argjum, ið Bjarti Thomsen varir av. Samtíðis sum Bjarti Thomsen fekk loyvið, fyrstu ferð í 1997, starvaðist hann á Fiskirannsóknarstovuni, ið er stovnur undir Fiskimálastýrinum/-ráðnum.

Landssstýrismálanevndin sigur í síni endaligari niðurstøðu, at í samband við spurningin um, hvønn týdning almenn starvssetan hevur fyri lutin sum umsøkjari ella umboð fyri umsøkjara í einum máli sum hesum, heldur nevndin tað vera átaluvera, at ongar reglur eru, sum seta etisk mørk fyri leiklutinum hjá almennum starvsfólkum í teirra privata virksemi mótvegis tí almenna.

Stutt eftir at Landsstýrismálanevndin á sumri 2000 fór undir at kanna málið við tunfiskaloyvunum, spurdi hon Jørgen Niclasen, landsstýrismann í fiskivinnumálum, um hesi viðurskiftini. Í svarinum sigur Jørgen Niclasen, at Fiskimálastýrið var vitandi um, at Bjarti Thomsen var í starvi á Fiskirannsólkknarstovuni og samstundis nevndarformaður og stigtakari í Sp/F Nancy. Landsstýrismaðurin vísti í svarinum á, at spurningurin um hansara almenna starv og leiklutur hansara sum nevndarformaður og stigtakari í samband við Sp/F Nancy vóru í ósamsvari við siðvenju fyri fólk í almennum starvi, var umrøddur í umsitingini. Har var niðurstøðan, at so var ikki.

Í brævi, sum Bjarti Thomsen sendi Fiskimálastýrinum í maj mánað í fjør, vísir hann á, at hann alla tíðina hevur arbeitt við opnum kortum, og harumframt legði upp til at Fiskimálastýrið skuldi góðkenna allar mannagongdir og sáttmálar, sum hann sum privatpersónur gjørdi við Fiskirannsóknarstovuna. Eisini í brøvum og á fundum sigur Bjarti Thomsen seg hava eftirlýst eini útsøkn frá Fiskimálastýrinum um tað var ein trupulleiki, at hann var í almennum starvi og samstundis fekst við royndarfiskiskap í privatum felag. Men Fiskimálastýrið kom ongantíð við eini tílíkari støðutakan.

Málið um leiklutin hjá Bjarta Thomsen fekk nógva umrøðu í fjølmiðlunum eftir ein fyrispurning á løgtingi í februar 2000. Tá segði Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni, við fjølmiðlarnar, at Bjarti Thomsen hevði spurt seg fyri hjá sær, um tað var í lagi, at hann fór uppí tunfiskavinnuna, eftir at hann fekk fyrstu veiðuloyvini í 1997. Hjalti í Jákupsstovu svaraði, at hann helt seg ikki kunna nokta hesum, tá stýrið, sum Fiskirannsóknarstovnan er undir, nevnliga Fiskimálastýri, hevði latið honum loyvið.

Í sama viðfangi segði Hjalti í Jákupsstovu tó, at hann hevur ongantíð hildið tað vera heppið at almenn starvsfólk hava privat størv við síðuna av, sum liggja tætt upp at almenna starvinum. Í døminum við Bjarta Thomsen og Fiskirannsóknarstovuni var tað óheppið, tí tað kundi vekja illgruna um misbrúk av vitan.

## Løgmaður onga viðmerking

Í sínum svari til Landsstýrismálanevndina hevur Jørgen Niclasen víst á, at málið um leiklutin hjá almennum starvsfólki í teirra privata virksemi móti tí almenna, er eitt mál, ið liggur undir ábyrgdini hjá løgmanni. Hesum tekur Landsstýrismálanevndin undir við. Nevndin skrivar í síni niðurstøðu, at tað er ábyrgdin hjá løgmanni at gera almennar reglur fyri, hvat almenn starvsfólk kunnu og ikki.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til niðurstøðuna hjá Landsstýrismálanevndini. Hann vísir á, at hann fyrst ynskir at svara Landsstýrismálanevndini, áðrenn hann hevur nakra viðmerking.

Løgmaður vísir tó á, at vit millum annað hava eina fyrisitingarlóg, og reglur um at almenn starvsfólk skulu ráðføra seg við stovnsleiðaran, áðrenn tey fara undir privat virksemi, ið hevur samband við teirra almenna starv.